# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

B71-HB:

## Kroystir sandoyingar



*HB vann tryggan sigur í Gundadali fyrr í ár, men í fjør dugdu sandoyingar serstakliga væl at arga sigursvanda høvuðsstaðarfelagið*

**B71 er framvegis á niðasta plássinum. Men á heimavølli fær liðið ofta góð úrslit, og tí verður vónin sett til, at HB fer norður við ongum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var dyggur smeitur hjá B71, at liðið í 9. umfarinum av Formula-deildini varð avbukað av Víkingi.

Tann dysturin undirstrikaði eisini veruleikan, sum eitt botnlið livir í, tí verður mótburðurin ov stórur, kann hetta veruliga senda fótbóltslagið í botn.

Og við reyða kortinum til Wellington Soares hevur B71 eisini ein spælara minni at seta í hópin hesaferð. Hinvegin er Eirikur Poulsen aftur tøkur, eftir at hann var úti seinast, men roknað verður ikki við, at Jóhannis Jensen er tøkur. Hann noyddist skaddur av vøllinum, tá B71 tapti móti Víkingi.

Í Havn hevur Rúni Nolsøe havt sera fáar spælarar til venjing hesa vikuna.

Bæði U- og A-landslið hava havt sínar uppgávur at hugsa um, og tí hevur manntalið til venjingarnar ligið um teir sjey spælararnar, sigur Rúni Nolsøe.

Fríggjadagin skuldi hópurin tó aftur verið á leið intaktur, og tá fæst eisini at vita, hvussu álvarsligur skaðin hjá Jákupi á Borg er, eftir at hesin noyddist at lata seg skifta út í Estlandi. Hartil eru Milan Kuljic og Mortan úr Hørg báðir úti við skaða. Ein av teimum, sum vanliga er við til at styrkja breiddina í hópinum, er Emil N. Leifsson, men hann er leikbannaður, og kann tí ikki takast inn í Formula-hópin hesaferð.

ÍF-NSÍ:

## Turkur í Fuglafirði og Runavík

**Síðani dramatisku uppgerðina millum NSÍ og ÍF í Runavík hevur tað hilnast illa hjá báðum feløgunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein tann mest dramatiska uppgerðin í níggju teimum fyrstu umførunum mundi tað vera, tá ið NSÍ á heimavølli vann 3-2 ímóti ÍF. Umframt fimm mál vóru áskoðararnir vitni til tvey reyð kort og trý brotsspørk. Tað seinasta varð dømt til ÍF í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, og tað misnýttu fuglfirðingar.

Hesa ferð verður oyggjauppgerðin í Fuglafirði. Felags fyri NSÍ og ÍF er tað, at úrtøkan hevur verið soltin, síðani innanhýsis uppgerðina. Fýra umfør eru avgreidd síðani minniliga dystin við Løkin. NSÍ hevur tvær ferðir spælt javnt, og tvær ferðir hevur NSÍ tapt. Í næstu royndini eftir vónbrotið við Løkin vann ÍF á heimavølli ímóti B71, men síðani hava fuglfirðingar tapt tríggjar ferðir á rað.

Hjá ÍF hevur Debus Danielsen verið plágaður av vøddaskaða tað mesta av árinum. Hann hevur ikki verið førur fyri at venja við fullari ferð, og tískil hevur hann fyri tað mesta bara spælt av og á. Knút Vesturtún er komin fyri seg aftur, eftir at hann ímóti gomlu liðfeløgunum í EB/Streymi 18. mai brákaði rivjabein. Vincent Jacobsen er farin at venja aftur, eftir at hann hevur verið uttanlands.

Áki Petersen og Høgni Madsen komu í gjár aftur av landsliðsferð. Eisini í NSÍ hava teir saknað tveir landsliðsspælarar í venjingunum hesa vikuna, men nú eru Jóhan Troest Davidsen og Einar Hansen komnir til hús aftur.

Einasti skaddi NSÍ spælarin er serbiski álosspælarin Dejan Stojkovic.

Seinnu árini hevur tað gingið illa hjá ÌF at vinna fulla úrtøku á heimavølli ímóti NSÍ. Seinastu ÍF heimasigurin ímóti teimum úr Runavík var í 2004, tá ið úrslitið var 4-2 til ÍF.







Sp/f ZARTEC Bygging Tlf. 226459
V/ Heðin B. Nielsen Tlf. 421403
Húsasmiður Fax. 421403